## Heðin hevur slitið krossbandið

**Roynt verður at sleppa undan skurðviðgerðini, og tí eru boðini í fyrsta umfari, at vøddarnir kring knæið skulu styrkjast við servenjingum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var longu tíðliga í januar mánaði, at Heðin á Lakjuni kendi til trupulleikar í knænum. Fleiri læknar hava síðani hugt at skaðanum, men fram til seinasta týsdag varð tó ikki mett, at talan var um so øgiliga álvarsligan skaða.

Tí var Heðin eitt nú eisini partur av landsliðsleguni í Florida um seinasta mánaðarskifti, men tá trupulleikarnir ikki vildu hvørva, gjørdist neyðugt við enn fleiri kanningum.

– Nú er staðfest, at aftara krossbandið í øðrum knænum er slitið. Fyribils havi eg tó fingið at vita, at neyðugt verður ikki við skurðviðgerð. Ístaðin havi eg fingið nakrar servenjingar, sum eg støðugt skal gera, soleiðis at vøddarnir kring knæið kunnu bera trýstið, sum krossbandið annars ber, staðfestir Heðin sjálvur um skaðan.

Hann dugir tó ikki rættiliga at siga, um hetta merkir fráveru til fyrstu dystirnar hjá KÍ í Formula-deildini.

– Eg havi so roynt at vant, og tað hevur gingið hampuligt, hóast eg havi merkt nakað til skaðan. Boðini frá læknunum eru tó, at eg eri klárur heilt skjótt, men um tað verður longu sunnudagin, dugi eg enn ikki at siga.



*Í fyrsta umfarið verður skurðviðgerð av knænum ikki mett sum neyðug, staðfestu læknarnir, tá teir í farnu viku kagaðu inn í knæið hjá Heðini á Lakjuni*

# Føroyameistararnir í bor

**FM fyri teir yngru leikararnar í borðtennis var um vikuskiftið í ítróttarhøllini í Trongisvági. Undirtøkan var góð, um 100 leikarar úr fýra ymiskum feløgunum kappaðust í ein- og tvímansleiki, um tilsamans 21 føroyameistaraskap**



*Smápinkur*



*Pinkur*



*Smápiltar*



*Piltar*

BORÐTENNIS
*Tíðindaskriv*

Sum skilst so hava leikararnir úti í feløgunum vant sera dúliga upp undir FM og sást tað eisini aftur av avrikum teirra.

Byrjað varð longu fríggjadagin klokkan fimm við smápinkum, smápiltum, pinkum og piltum, og hildið varð áfram til midnátt, tá ið teir flestu leikararnir vóru útlúgvaðir, eftir at hava leikt borðtennis í góðar sjey tímar. Tó sluppu nakrir teirra bert heim til ein lítlan blund, tí longu klokkan nýggju leygarmorgun varð lagt til bróts aftur við smágentum og smádreingjum. Eftir døgurða blivu síðani FM vinnararnir hjá gentum, dreingjum, kvinnuog mansunglingum funnir.

### Nýtt felag

Hjá felagnum Royn úr Hvalba var hetta bert onnur kappingingin í ár, sum felagið hevur luttikið í. Hetta kemst av teirri orsøk, at felagið hevur ligðið stilt í nøkur ár, eftir at tað mitt í 90´unum var stórt borðtennisvirksemi í Hvalba. Nú er Royn so við aftur og vónandi fara hvalbingar at halda fast um allar teir leikarar, sum nú spæla við felagnum og sum í framtíðini koma at spæla fyri felagið.

Í vikuskiftinum luttók Royn við heili 15 leikarum í aldrinum 8 til 14 ár og megnaðu hesir at vinna ikki minni enn eitt gull, tvey silvur og eitt bronsu heiðursmerki. Hetta má sigast at verða sera væl klára, eftir at felagið bert hevur verið virkið í eitt gott hálvt ár.

### Tey minstu

Í smápinku- og smápiltadeildini luttóku ávíkavist 10 og 12 leikarar. Býtt var síðani upp í tveir bólkar við 5 og 6 leikarum í hvørjum. Eftir at øll høvdu leikt ímóti øllum í bólkaspælinum, høvdu Anna Mikkjalsdóttur, Durita Jensen, Lív Øster og Eva Midjord leikt seg í hálvfinalunar hjá smápinkum, og Hans Jón Jacobsen, Bjørgvin Sveinbjørnsson, Eyðfinnur Jensen og Árnfríður Olsen hjá smápiltunum. Anna, Durita, Hans Jón og Eyðfinn vunnu øll sína hálvfinalu og møttust tey tí í finaluni. Anna vann ein sera tættan dyst ímóti Duritu og Hans Jón vann á Eyðfinni, og gjørdist tey tí gullvinnarar í ávíkavist smágentu- og smádreingjadeildini. Nummar trí gjørdist Lív og Bjørgvin.

Pinkur og piltar byrjaðu ikki fyrr enn klokkan gott átta, men vóru hesar deildir heldur skjótari at avgreiða enn aðrar. Í finaluni hjá pinkum vann Marin Brattalíð ein sera tættan og spennandi dyst, ímóti liðfelagnum Biritu Mortensen, har fimm sett máttu til, áðrenn ein vinnari var funnin. Nummar trí gjørdist Sára Hentze við at vinna 3-0 á Annu Mikkjalsdóttur.

Í piltadeildini eru tað eisini fleiri javnir leikarar og tí var einki avgreitt, fyrr enn hvør bóltur var leiktur. Tó megnaðu Rasmus Potts og Heini Mortensen, sum hevði verið darvaður av sjúku alla vikuna, at leika seg í finaluna, við at vinna á ávíkavist Mathias Mortensen og Patrik Johannesen. Finaluna vann Rasmus heili 3-0 á Heina, sum aldrin fekk tamarhald á teimum góðu og hørðu loopunum frá Rasmus. Í einum tøttum og javnum dysti um triðja plássi, megnaði Mathias at vinna 3-2 á Patrik og har við ogna sær bronsuheiðursmerki í piltadeildini.

### Sera tætt

Í smádreingjadeildini hava altíð nógvir leikarar luttikið og tí var roknað við einari langari og sera drúgvari kapping. Og so var, byrjað var klokkan níggju og góðar fýra tímar seinni høvdu vit langt um leingi funnið ein vinnara. Heili fýra innleiðandi bólkar skuldu avgreiðast, áðrenn klárt var at fara ígongd við fjóðrings- og síðani hálvfinalurnar. Eftir at Gilli Sørensen og Fróði Jensen í hálvfinalunum høvdu bast Jákup Thomasen og Hugin Albinus, var lagt upp til eina spennandi finalu, sum stóð ímillum nummar eitt og tvey í Grand Prix kappingini í ár. Finalan gjørdist ein sannur gysari, har heili 56 bóltar máttu til, bert fyri at avgreiða annað sett, sum endaði 27-29 til Fróða. Eftir fjórða sett stóð ájavnt í settum 2-2 og tí mátti eitt fimta og avgerandi sett til, áðrenn ein vinnari var funnin. Gilli legði út sum eitt ódnarveður við at føra 5-1, men eftir at b‡tt var um síðu, megnaði Fróði at hála seg framm um aftur 5-7. Tá ið so støðan var 9-9, hevði Fróði ein møguligan fyrimun við at hava servuna og kundi tí vinna setti 9-11. Ein sera spennandi dystur, har leikararnir vóru alt ov varnir við sínum spælið, tí eingin vildi gera feilir og tí tapa bóltin.

Smágenturnar vóru bert nýggju í tali og leiktu tær tí allar í einum finalubólki, har Sheila Strøm var greiður favorittur, men tó kundi hon fáa nakað av mótstøðu frá Rakul Mikkjalsdóttur. Sum vanta, so gjørdist Sheila vinnari við átta sigrum á rað, eftir at hava vunnið 3-1 á Rakul í tí alt avgerandi dystinum teirra millum. Silvur fekk Rakul og bronsuheiðursmerkið fór til Marin Brattalíð, sum var ájøvn í stigum við Biritu Mortensen, men eftir finteljing var tað Marin, sum streyk avstað við bronsuni.

### Greiðir vinnarar

Í dreingjadeildin gjørdist ikki so spennandi sum vóna, har Reidar Luid vann í finaluni ímóti Róa Agnarsson, sum í hálvfinaluni hevði bast Pætur Albinus. Í dystinum um triðja pláss vann FM vinnarin í smádreingjadeildini Fróði Jensen 3-2 á Pætur.

Hjá gentunum vann Susie Midjord á Sheilu Strøm í finaluni. Nummar trý gjørdist Joan Thomasen við at vinna á finalistinum í smágentudeildini Rakul Mikkjalsdóttur.

### FM favorittarnir fullu

Í teimum yngru deildunum hava Marin í Dali og Ragnar Egilsson vunnið sínar deildir í fleiri ár, men nú er hørð kapping komin frá fleiri øðrum leikarum.

Hjá kvinnuunglingum luttóku átta leikarar í einum finalubólki, har allar skuldu møta øllum. Størstu favorittarnir máttu verða Marin í Dali og Susie Midjord, sum báðar hava vunnið kvinnudeildina tvey tey seinastu árini. Undan dystinum teirra millum, sum var alt avgerðandi, hevði Sheila Strøm og Susie ognað sær 12 stig og Marin 10 stig, so lagt var upp til ein spennandi og avgerðandi dyst. Susie lat ongan iva verða og við at vinna ímóti Marin, vann Susie allar sínar sjey dystir og har við eisini FM heitið. Dysturin var sera tættur og máttu fimm sett til, fyri at finna ein vinnarar. Fimta settið endaði 12-10 til Susie. Hevði har aftur ímóti Marin vunnið 3-0, so hevði tað verið Sheila, sum fekk gull, Marin silvur og Susie bronsu.

Í mansunglingadeildini var Ragnar Egilsson, mettur sum tann største favoritturin, men í seinastuni hava aðrir leikarar ment seg sera nógv og tí er munurin teirra millum nú enn minni. Deildin var býtt upp í tveir bólkar við 5 leikarum í hvørjum bólki. Í bólki A vóru leikararnir Rói Agnarson, Ragnar Egilsson, Reidar Luid og Hallur Thorsteinsson. Dystinir gjørdist sera tættir við fleiri fimm settarum og tá ið allir dystirnir vóru leiktir høvdu 3 leikarar 6 stig. Hallur hevði settmunin +1, Reidar +2 og Ragnar +3 og leiktu tí tveir teir síðst nevndu seg í hálvfinaluna, har Sigurð Carlsson og Pætur Albinus bíðaðu, eftir at hava vunnið á Fróða Jensen og Vagnur Thomsen. Heilt óvanta, so vann Pætur á Ragnar og Reidar á Sigurð og tí var lagt upp til eina spennandi finalu, ímillum teir báðar, sum endaðu á øðrum plássi í hvør sínum bólki í innleiðandi umfarinum. Pætur legði